Fiskirannsóknarstovan

# Dyrging eftir makreli

## Royndir gjørdar við M/b Ægir

FRS smárit 00/01

# Dyrging eftir makreli

**Skip:** M/b Ægir

**Tíðarskeið:** 14/8 – 28/8 1999

**Ábyrgd:** Kristian Zachariassen

**Við fyri Fiskirannsóknarstovuna:** Kristian Zachariassen & Rúni Joensen

**Skrivað frágreiðing:** Kristian Zachariassen

**Endamál:** Endamálið við royndunum var at royna eftir makreli við langdorg undir Føroyum. Útróðrarmenn siga seg ofta fáa makrel um summarið við snellu. Tí varð avgjørt at vita um tað ikki bar til at dyrgja eftir makreli undir Føroyum við langdorg eins og gjørt verður í Noregi. Fólk frá Fiskirannsóknarstovuni var í 1997 í Egersund og kunnaði seg um, hvussu teir dyrgja eftir makreli. Í 1998 vórðu royndir gjørdar við einum minni báti at dyrgja eftir makreli innarlaga í føroyskum sjóøki. Úrslitið var vánaligt og mett var, at møguliga kundi eitt betri úrslit fáast, um ein størri bátur varð leigaður til endamálið, soleiðis at liggjast kundi úti í fleiri dagar í senn og leitast kundi longur úr landi.

**Úrslit:** Úrslitið var sera vánaligt. Tilsamans fingu vit bert nøkur fá 100 kg. Roynt var sera víða í føroyskum sjóøki. Roynt var heilt inni við land og heilt norðuri, har russar fiska við flótitroli eftir makreli.
Mynd 2 vísir, hvar dyrgt varð.

**Útgerð og framferðarháttur:** Til royndirnar varð báturin M/b Ægir úr Tórshavn nýttur. M/b Ægir er ein 50 brt træbátur, sum fiskar við línu um veturin og er við snellu undir Føroyum og Íslandi um summarið. M/b Ægir er útgjørdur við allari vanligari útgerð, so sum snellum, radara og ekkoloddi.
At fiska við nýttu vit fýra dyrgiskipanir frá frá Oil Wind. Dyrgiskipanirnar stóðu í samband við elektroniskar snellur, tær somu, sum báturin nýtir, tá hann fiskar við snellu.
Á dyrgiskipanunum vóru langdergur við millum 32 og 40 húkum á. Ein langdorg var nýtt til hvørja dyrgiskipan. Á dergrunum vóru húkar nr. 7, sum eitt reytt slangupetti var koyrt upp á til beitu. Loddini á endunum á dergrunum vigaðu millum 5 og 10 pund. Umleið 35 cm vóru millum húkarnar.
Dyrgiskipanirnar eru gjørdar soleiðis, at makrelurin sjálvur fer av, tá dorgin verður drigin inn. Makrelurin kemur ímóti einum kippara, tá hann er komin innum og fer síðan í ein kassa. Á henda hátt er møguligt at fiska samanhangandi og ikki steðga á at krøkja makrelin av.
Sum nevnt vórðu 4 skipanir nýttar, tvær í hvørjum borði. Tær vórðu settar upp aftan fyri stýrhúsið og framman fyri miðjuna á skipinum. Sí mynd 1.

Fyri at dergrurnar ikki skuldu fløkjast var neyðugt at hava tyngri lodd á teim fremru dergrunum. Roynt varð at hava 5 punds lodd á teim fremru og 7 punds lodd á teim aftaru, og at hava 7 punds lodd á teim fremru og 10 punds lodd á teim aftaru. Tað seinna vísti seg at vera betur, tí annars klárar loddið ikki at draga húkarnir útaftur orsakað av at loddið er ov lætt. Um meira enn 30 fv av nylon varð lorað út á fremru dergrunum, komu húkarnir ofta í trol við tær aftaru. Á teim aftaru dergrunum varð roynt at hava millum 40 og 80 fv úti, men tó høvdu vit fyri tað mesta 50 fv úti.

Mynd 1 vísir uppseting av dyrgiskipanum.

**Niðurstøða:** Royndirnar í ár og í 1998 eydnaðust ikki gott, veiðan var sera lítil. Í ár royndu vit eisini longri úti enn í 1998, men fingu tó sera lítið. Besti dagurin var uml. 500-600 pund.
Makrelur er í føroyskum sjóøki. Spurningurin er bara um hann stendur nóg tættur til at hann kann fáast í stórum nøgdum við langdorg.
Um so er at makrelurin stendur nóg tættur til at kunna fiskast við dorg, so er møguligt at gangur frá snellunum er ein orsøk til vánaliga fiskiskapin. Bátarnir, sum fiska makrel við dorg í Noregi nýta fyri tað allarmesta elektriskar snellur. Makrelur er ein fiskur, sum svimur allatíðina og tí helst sera viðbrekin at fáast við. Elektriskar snellur halda minni gang enn oljutrýst snellur.

Makrelurin, sum vit fingu, var stórur. Teir flestu vóru størri enn 600 gramm og allir vóru størri enn 400 gramm. Hesin makrelur hevur tann besta prísin, so um nøgdirnar vóru størri, kundi tað væl loyst seg at dyrgt eftir makreli.




Mynd 1. Uppseting av dyrgiskipanum.




**Mynd 2. Myndin vísir hvar dyrgt varð eftir makreli.**